Oljuhavnin riggar av

Eftir eitt ár við nógvum akiviteti, eru runavíkingar nú farnir at rigga av á oljuhavnini, men hetta merkir als ikki, at virksemið verður niðurlagt

OLJUHAVN
Jákup Mørk

Hetta seinasta hálva árið ella so hava einir 10 mans hjá Skipafelagnum arbeitt burturav á oljuútgerðarhavnini.

Størsti parturin av arbeiði teirra hevur sjálvandi verið í samband við royndarboringarnar hjá Statoil, BP og sjálvandi Amarada Hess,ið jú vórðu teir fyrstu at finna svarta gullið.

Nú verður Sovereign Explorer fluttur úr føroyskum sjóøki, og tí verður væl minni av virksemi komandi tíðina, enn runavíkingar so dánt eru um at verða vanir við.

Nóg mikið at taka í

Hóast einki arbeiði verður í samband við oljuboring fyrr enn tað aftur fer at vára, so verður arbeiðsfólkið á oljuhavnini ikki sent til hús. Tað verður tó ein broyting í gerandisdegnum, tí nú verður talan aftur um vanliga virksemið hjá Skipafelagnum við at lasta og lossa skip. Nú verður tað so fiskurog ikki oljuútgerð.

Annars lata tey væl at hesum fyrsta oljutíðarskeiðnum í Runavík. Arbeiðið við at landa og lossa hevur gingið avbera væl, og enn hevur so eingin mansskaði verið av nøkrum slag.

Eisini hevur samstarvið við føroysku myndugleikarnar verið gott, so hóast nógv nýggj tiltøk hava verið sett í verk í gerandisdegnum, og hóast nógvar nýggjar mannagongdir skuldu lærast, so hava eingir trupulleikar verið av týdningi.

Fyrsta oljutíðarskeiðið í Runavíkini er nú av, og á Skipafelagnum lata tey væl at gongdini higartil

Álop á Irak kann spjaða altjóða eindina

Ger USA álvara av tosinum um at leypa á Irak sum lið í bardaganum ímóti altjóða yvirgangi, kann tað beina fyri altjóða eindini aftan fyri bardagan. Ósemja er longu millum USA og Bretland

ÚTLAND:

Amerikanarar hava ikki sagt beinleiðis, at teir fara at leypa á Irak, men ráðharrar í Bush-stjórnini hava fleiri ferðir sagt, at Irak er eitt av teimum londunum, sum stuðlar altjóða yvirgangsvirksemi. So seint sum mánadagin segði George W. Bush, forseti, at irakski leiðarin, Saddan Hussein, eigur at loyva vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST at halda fram við arbeiðinum at kanna landsins vápnagoymslur. Spurdur, hvat hendir, um irakski forsetin sýtir fyri at eftirlika hesum, svaraði Bush stutt:

– Tað fær hann at sígga.

Í amerikanska verjumálaráðnum eru kreftir, sum mæla Bush forseta til at leypa á Irak, so skjótt kríggið í Afghanistan er av. Hesir vísa á, at tað er ikki neyðugt at kanna vápnagoymslurnar hjá irakum, tí í einari niðurstøðu hjá ST stendur, at Irak eftir øllum at døma framvegis hevur hópoyðingarvápn. Teir halda tí, at USA hevur rætt til at søkja at Irak.

Kann enda við spjaðing

Men tað er samstundis greitt, at nógv lond í eindini, sum stendur aftan fyri bardagan ímóti altjóða yvirgangi, fara at mótmæla, at amerikanarar leypa á Irak. Fleiri muslimsk lond, sum eru við í eindini, hava boðað frá, at tey fara ikki at góðtaka, at Irak verður álopið.

Men amerikansku álopsætaninar fáa heldur ikki undirtøku vestanfyri. Bretska blaðið Financial Times skrivar, at Tony Blair, forsætisráðharri hevur ávarað Bush forseta ímóti at draga Irak upp í kríggið, tí tað hevði gjørt enda á altjóða eindini, sum fekst í lag eftir drúgvar samráðingar.

Sambært Financial Times hevur bretska ávaringin havt við sær, at amerikanarar hava sýtt fyri at lata bretskar hermenn taka lut í krígnum í Afghanistan. Umleið 6.000 bretskir hermenn hava staðið til reiðar at fara til Afghanistan, men teir eru farnir at gera vanliga hertænastu aftur, skrivar blaðið.

Bretska útvarpið BBC segði týsdagin, at tað vóru teir sonevndu »heykarnir« í amerikansku stjórnini, sum gjørdu, at Bretland ikki fekk boð um at senda hermenn til Afghanistan.

Ákæra Russland fyri etniska útreinskan

Mannarættindafelags skapir ákæra nú russisku myndugleikarnar fyri at hava hert ágangin ímóti sivilfólkinum í Kekenia eftir atsóknirnar í USA 11. september

ÚTLAND:

– Myndugleikarnir hava hert ta etnisku útreinskanina, uttan at nakar leggur tað til merkis, sigur Tatiana Kasatkina í russiaka mannarættindafelagsskapinum Memorial. Hon vil vera við, at fleiri fólk eru horvin í Kekenia síðani tann 11. september.

Tatiana Kasatkina kom við upplýsingunum undir einum orðaskifti um Kekenia, sum Evroparáðið hevur skipaði fyri í Strasbourg mánadagin og týsdagin. Aðrir russiskir mannarættindafelagsskapir, sum vóru á ráðstevnuni, tóku undir við henni.

Men russiski umboðsmaðurin fyri syðra part av Kekenia, Nikolai Britvin, vísti ákærunum aftur.

– Moskva hevur ávarað ímóti islamskum yvirgangi í fleiri ár, uttan at nakar hevur lurtað eftir okkum, segði hann.

Russland sendi hermenn til Kekenia í oktober í 1999, og russisku myndugleikarnir hava alla tíðina sagt, at hernaðarliga átakið er vent ímóti muslimskum yvirgangsmonnum, sum ætla at skipa eitt muslimskt ríki í Kaukasus.

(Fartekst)

ítróttur

Nr. 231 • hósdagur • 29. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Støðan 1. deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	7	7 - 0 - 0	217	130	87	14
2	Stjørnan	7	6 - 0 - 1	205	155	50	12
3	Neistin	8	6 - 0 - 2	180	154	26	12
4	VB	8	4 - 0 - 4	198	198	0	8
5	Sóljan	8	2 - 0 - 6	170	227	-57	4
6	Kyndil	9	1 - 0 - 8	199	246	-47	2
7	StÍF	7	1 - 0 - 6	124	183	-59	2

Kyndil-Sóljan 21-23 (6-11):

Sóljan úr botninum

Við sigrinum á Kyndli týskvøldið vann Sóljan seg upp úr botninum á stigatalvuni, har tað nú av álvara tykist at sansa at hjá Kyndli

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Í løtum tóktist Kyndil at kalla bert at hugsa um stórskjúttan, Asta Petrauskiene, ímeðan tær fullkomuliga gloymdu hinar leikararnar hjá Sóljuni
Mynd: Álvur Haraldsen

Sóljan vann ein heldur óvæntaðan sigur á Kyndli í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn týskvøldið. Tað skal tó alt fyri eitt leggjast afturat, at hóast óvæntaður, so var sigurin hjá Sóljuni fult uppiborin.

Átta á rað

Tað var rættiliga tíðliga í dystinum greitt, at tað fór at alt annað enn lætt hjá Kyndli at gera nakað við mótstøðuna.

Gestirnir løgdu nevnliga sera bragdliga fyri. Í verjuni lótu tær ongan mótspælara koma fram við sær, og í álopinum lá væl fyri at koma til skot. Ikki minst hevði tað stóran týdning, at Kyndil at kalla bert hugsaði um stórskjúttan, Asta Petrauskiene, ímeðan tær fullkomuliga gloymdu, at í hondbólti eru tað vanliga seks spælarar, sum mynda eitt álop.

Áðrenn Kyndil fekk fyrsta málið, hevði Sóljan skorað heilar átta ferðir, og hetta setti so avgjørt sín dám á kyndils-spælið. Hóast liðið telir fleiri av stinnastu føroysku hondbóltsleikarunum – ikki minst á bakplássunum – so bar einki til. Sjálvsálitið var fullkomuliga burtur, og heldur enn at royna at hótta málið, var talan um rættiligan alibi-hondbólt. Leikararnir óttaðust at gera mistøk, og tordu tí ikki annað enn at flyta bóltin víðari, og tá so onkur hissini skotroynd kom, gav hetta sjáldan nakrar veruliga trupulleikar fyri mótstøðuna.

Hjá Sóljuni var støðan hin heilt øvugta. Fyrst og fremst tí at hugburðuri hjá leikarunum var so nógv øðrvísi. Heldur enn at líta alt upp í hendurnar á Astu (sum tó sjálvsagt var ein týðandi liður), so royndu allar sítt ítarsta til at spæla seg ígjøgnum verjuna, og ikki minst var tað ein sonn fragd at síggja tryggu skoringarnar hjá Herthu Simonsen, sum sjáldan gav Kyndils-málverjanum nakran sum helst møguleika.

Stríddu seg innaftur

Ikki fyrr enn 12 minuttir vóru leiktir, brast fyri nev hjá Kyndli, og í mangar mátar var tað júst hetta, sum skuldi til, fyri at nakað av sjálvsáliti kom aftur í spælið. Tær ressaðust eitt sindur, nú tað brádliga bar ti at skora, og umframt at álopsspælið nú gjørdist meira skipað, so fingu tær eisini tak á verjuspælinum. Ikki minst takkað verið mansverju av litaviska stórskjúttanum hjá Sóljuni.

Tær fingu minkað munin niður í fimm mál undan steðginum, og í seinna hálvleiki settu tær av álvara ferð á. Ikki minst var Lotte Sørensen komin væl við, bæði vi at skjóta og at spæla upp, og tá 20 minuttir restaðu av dystinum, hevði Kyndil mest sum vunnið seg inn á gestirnar.

Týðandi málverji

Tey flestu mundu nú rokna við, at Kyndil skuldi fara at koppa øllum, men sum úrslitið sigur, so eydnaðist hetta ikki, og tað eydnaðist heldur ongan tíð Kyndli at leggja seg á odda.

Hóast tað heilt týðiligt kom fjáltur á Sóljuna, nú munurin brádliga var so lítil, so fullu tær tó ikki í fátt. Heldur fóru tær at stríðast enn meira, og hóast hetta kostaði bæði brotskøst og útvísingar, so breyt hetta góðu rútmuna hjá Kyndli. Og so hevði Sóljan eisini Kristinu Griksaite í málinum.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki tók málverjin kanska ikki tað heilt nógva, men tá tað veruliga sansaði at, prógvaði hon kortini, at hon telist millum bestu málverjar í landinum. Hvørja ferð Kyndil hevði møguleika at leggja seg á odda, togaði hon ena týdningarmikla bjarging fram, og so kundi tað vera tað sama, um tær hjá Kyndli vóru púra leysar ella royndu seg frá sjey metrum. Kristina hevði sálarliga takið á mótstøðuni, og spakuliga smittaði hetta eisini viðleikarar hennara.

Sálarliga kostaði hetta eisini nógv hjá Kyndli, og at tær bert fingu tvey mál seinastu 10 minuttirnar sigur helst eisini tað mesta um, at leikararnir »ikki duga« at vinna. Tær megnaðu snøgt sagt ikki at taka møguleikan, tá hesin beyðst, og hetta er ein avgerandi fortreyt at vinna.

Sær betri út

Á stigatalvuni merkti sigurin, at Sóljan vann seg úr botninum, og umframt at støðan nú er betri, enn hon var um sama mundi í fjør, so er eisini annað, sum bendir á, at Sóljan í ár hevur betri møguleika at verða verandi í deildini, enn tær høvduum sama mundi í fjør.

Leikararnir tykjast bæði kropsliga og sálarliga at vera betri fyri. Liðandin tykist vera nógv betri enn í fjør, og ikki minst hevur tað týðning, at hóast útlendska arbeiðsmegin framhaldandi er sera týðandi partur av liðnum, so stendur og fellur alt ikki við hesari.

Dysturin í tølum

Kyndil-Sóljan 21-23 (6-11)

Málskjúttar:
Kyndil: Lotte Sørensen 8(3), Annika Ljósstein 7(2), Palma Petersen 2, Anja Johannesen 2, Linda Weihe 2
Sóljan: Hertha Simonsen 8, Asta Patrauskiene 6(2), Sólja Jóanisdóttir 3, Heidi Maria Akselsen 2, Marjun Johansen 2, Jóhanna í Horni 1, Fía Selma Nielsen 1
Brotskøst: Kyndil 6, Sóljan 2
Útvísingar: Kyndil 3, Sóljan 4
Dómarar úr StÍF: Pole Hansen & Justines Justinussen. Megnaðu so nøkun lunda at halda gongd í einum til tíðir rótutum dysti, men framvegis saknar tú fylgidómar í ávísum førum.